UTTAN ÚR HEIMI

## Spaniumenn atkvøða um ES-grundlóg

Sum teir fyrstu fara veljararnir í Spania at taka støðu til ta nýggju ES-grundlógina á fólkaatkvøðu í morgin.

Meiningakanningar hava víst, at stórur meiriluti er fyri grundlógini, men tað kann gerast ein trupulleiki, at áhugin fyri fólkaatkvøðuni tykist ikki vera serliga stórur. Tí hevur José Luiz Zapatero, forsætisráðharri, eggjað fólki til at fara í valhølini í morgin. Í einari roynd at vekja áhuga fyri grundlógini hevði hann boðið týska kanslaranum, Gerhardi Schrøder, til Spania, og í einari røðu í býnum Zaragoza mælti hann fólki til at greiða atkvøðu.

Tann størsti andstøðuflokkurin, tann konservativi PP, vil ikki taka undir við ES-grundlógini, men væntandi fara fleiri konservativir veljarar kortini at atkvøða fyri henni.

## Skulu spara oljupengar

Norski tjóðbankastjórin, Svein Gjedrem, ávarar nú teir norsku politikaarnar ímóti at brúka ov nógvar pengar úr tí almenna oljugrunninum.

Høvuðsreglan er, at politikaarnir eiga ikki at brúka meiri enn fýra prosent av vinninginum hjá grunninum um árið, men í ár hevur Stórtingið samtykt at brúka seks prosent. Men tað er ov nógv, heldur Svein Gjedrem. Í einari røðu fyrrakvøldið segði hann, at tað gongur væl í norska búskapinum, og at ov nógvir oljupengar kunnu hava við sær, at ov nógv ferð kemur á búskapin.

Svein Gjedrem heldur, at politikararnir eiga at tálma teimum almennu íløgunum tey næstu árini. Tørvurin á nýíløgum verður størri seinni, og tí er rætt at skerja útreiðslurnar nú, sigur tjóðbankastjórin. Hansara uppskot er, at politikararnir eiga at halda seg til regluna um at brúka í mesta lagi fýra prosent av vinninginum hjá oljugrunninum um árið.

## Ódnarveður

Ein ógvuslig melduródn, sum hevur fingið navnið "Olaf", herjar í Kyrrahavinum í hesum døgum.

Hósdagin herjaði ódnin tær amerikonsku Samoa-oyggjarnar, og í gjár hevði hon beina kós ímóti Cook-oyggjunum. Myndugleikarnir á Samoa-oyggjunum søgdu í gjár, at fleiri hús vóru farin í ódnarveðrinum, og at minst eitt skip var sokkið. Tólv mans vóru við skipinum, og flogfør úr Ný Sælandi leitaðu í gjár eftir manningini. Á oyggjunum Ta'u, Ofu og Olosega gjørdi ódnin eisini stóran skaða, men einki er frætt um, at nakar er deyður har.

Veðurmenninir siga, at "Olaf" er tann ringasta meldurødnin í fleiri ár. Í gjár nærkaðist hon Cook-oyggjunum, har tvær meldurødnir hava herjað fyrr í ár. Í gjár var vindferðin í ódnini umleið 250 kilometrar um tíman.

## Ógvusligt vetrarveður

Gloprarregn og kavarok hava kravt umleið 640 mannalív í Pakistan seinastu fjúrtan dagarnar.

Myndugleikarnir siga, at nógv fólk eru druknað, tí at byrgingar eru skrædnaðar, og nógvastaðni hava fleiri bygdir ligið undir í vatni í fleiri dagar. Aðrastaðni eru heilar bygdir skolaðar burtur.

Illveðrið hevur eisini gjørt um seg í grannalandinum Afghanistan, og har hava kavi og kuldi kravt minst 260 mannalív, siga myndugleikarnir. Heilsumálaráðharrin, Mohammad Amin Fatimie, sigur við Reuter, at nógv børn eru deyð, tí tey toldu ikki tann nógva kuldan.

# Vandi fyri heimsumfatandi oljukreppu

**Vit kunnu fáa eina heimsumfatandi oljukreppu fyrr, enn tey flestu gruna, og oljuútbúnaðurin er eitt av fremstu álopsmálunum hjá yvirganginum**

OLJUKREPPA

*Árni Joensen*

*fartekst@mail.dk*

Hevur altjóða granskingarstovnurin Worldwatch Institute rætt, kann tað væl henda, at oljuframleiðslan í heiminum fer at minka longu um eini tvey ár. Tann vanliga uppfatanin hevur annars verið, at tað fer at bera til at økja framleiðsluna nógv ár afturat, men Worldwatch Institute sigur í sínari nýggju ársfrágreiðing, at munurin ímillum framleiðslu og eftirspurning fer at veksa í komandi árum.

Jarðfrøðingurin Colin Campbell er eftir drúgvar útrokningar komin til ta niðurstøðu, at oljuframleiðslan í heiminum fer at minka longu í 2007, samstundis sum eftirspurningurin eftir olju fer at veksa nógv. Sambært Worldwatch Institute eru teir høgu oljuprísirnir nú ein fráboðan um eina komandi oljukreppu.

– Fyri 30 árum síðanui dugdi eingin at siga, at vit fóru at fáa eina oljukreppu tá. Støðan er tann sama í dag. Tað er týðiligt, at trot er á olju, men tað er ikki nøkur kreppa, sum hevur gjørt, at tað er so. Men marknaðurin er viðbrekin. Brestur ein bumba í einari av avskipingarhavnunum í Saudiarabia, hava vit eina heimsumfatandi oljukreppu, sigur norðmaðurin Øystein Dahle, sum er nevndarformaður í Worldwatch Institute. Hann veit, hvat hann tosar um, tí í fleiri ár var hann stjóri í Norsk Esso.

Øystein Dahle sigur við Dagsavisen, at eitt bumbuálop á ta størstu oljuhavnina í Saudiarabia fer at leggja heimsins størsta oljuútflytaraland lamið. Tað fer at hava við sær, at marknaðurin missir einar átta milliónir tunnur um dagin, og tað fer so aftur at gera, at oljuprísurin fer úr 50 upp í 100 dollarar fyri tunnuna. Fyri USA, sum innflytir tíggju milliónir tunnur av olju um dagin, merkir tað 500 milliónir dollarar í eykaútreiðslum hvønn dag, og tað tolir amerikanski búskapurin ikki, sigur Øystein Dahle.

### Yvirgangur

Í ársfrágreiðingini skrivar Worldwatch Institute, at tann stóri týdningurin, sum oljan hevur, leggur lunnar undir meiri yvirgang. Víst verður á, at USA og onnur lond styðja myndugleikar í londum sum eitt nú Saudiarabia fyri at tryggja sær bíliga olju. Yvirgangur hevur tey bestu gróðrarlíkindini í londum, har fólk ikki hava politisk rættindi, og teir flestu flogrænararnir, sum søktu at USA 11. september í 2001, vóru saudiarabar.

– Tann heimsumfatandi bardagin ímóti yvirgangi ger, at minni verður hugsað um teir grundleggjandi trupulleikarnar so sum fátækradømi og ovurnýtslu av náttúrutilfeingi. Tað einasta, vit kunnu gera, er at fáa meiri burtur úr orkuni og at menna varandi orkukeldur, stendur í frágreiðingini hjá Worldwatch Institute, sum leggur afturat, at betri gagnnýtsla av umhvørvinum hevur avgerandi týdning fyri trygdina í heiminum.

# USA fær umstríddan fregnartænastustjóra



*Nýggi amerikanski fregnartænastustjórin John Negroponte*

**John Negroponte er settur ovasti fyri øllum teimum 15 amerikonsku fregnartænstunum**

STJÓRASETAN

*Árni Joensen*

*fartekst@mail.dk*

Í fjør gjørdi amerikanska stjórnin at samskipa arbeiðið hjá øllum teimum 15 fregnartænastunum, og fyrrakvøldið boðaði George W. Bush, forseti, frá, at hann hevði gjørt av at seta John Negroponte felags stjóra fyri øllum tænastunum.

Negroponte hevur ta seinastu tíðina verið amerikanskur sendiharri í Irak, og hann var sendiharri í ST, áðrenn hann fór til Bagdad. Hann sigst vera ein dugnaligur diplomatur, men hann er kortini ikki líka væl umtóktur allastaðni. Í Miðamerika minnast mong hann sum mannin, ið stóð fyri arbeiðinum at útvega uppreistrardeildunum í Nikaragua vápn, og tað var eisini hann, sum samskipaði amerikanska stuðulin til tey sokallaðu deyðsliðini í Miðamerika, skrivar AP-tíðindastovan.

– John Negroponte hevur eina óhepna fortíð, sum verandi stjórn vil hava okkum at gloyma, sigur ein granskari á National Security Archives í Washington við AP.